# Eitt satt gospel-fýrverk



*Kórið United Voices*



*Heini Lützen*



*Laila Hansen*

UMMÆLI

*Orð: James Olsen*
*Myndir: Jens K. Vang*

Tilvildin vildi tað soleiðis, at okkara egna Linda (Andreasen) Holmberg herfyri til eina framførslu av donsku fløguútgáuni "Det handler om Jesus", varð biðin um at framføra ein føroyskan tekst til ein av sangunum. Eftir hetta kom hugskotið til eina føroyska útgávu, og úrslitið bæði sóu og hoyrdu vit framført sera mestarliga sunnukvøldið 8. juni kl. 22.00 uppi í Ítróttarhøllini á Hálsi.

Konsertin varð ein sokallað "útgávukonsert", har bert løg av fløguni vórðu spæld. Fløgan hevur fingið heitið "Vit kunngera Jesus" og tað eru tey bæði Linda (Andreasen) Holmberg og maður hennara Michael, ið hava framleitt hana saman við Niels Engell Hansen.

Eg møtti upp beint fyri kl. 22.00 og tá var enn ein long røð av fólki uttanfyri, ið vildi sleppa inn fyri at hoyra og síggja tað, ið kvøldið hevði at bjóða uppá. Eg kann lova tær, ið lesur hetta ummæli, at eingin fór skuffaður út aftur úr høllini uppi á Nabb aftaná hesa "fýrverks-konsert"!!

Stemningurin var góður á øllum teimum uml. 1.000, ið vórðu samlað. Framman fyri pallin varð pyntað við vøkrum ljósastakum og alt annað, ið sera hegnisliga varð fyrireikað, setti ein frálíkan stemning og hugna inni í høllini.

Frásøgumaður hetta kvøldið var Eyðun Jacobsen. Vit vórðu øll bjóðað vælkomin og presenteraði hann síðani egna gospelkór okkara "United Voices", við Eirikki Skála sum leiðara, ið sera hegnisliga leiddi kórið í 4 sangum, sungnir við ymiskum solistum, sum t.d. Ruth Skarðenni, Sannu á Borg, Billy Hansen og Heina Lützen. Satt at siga, so má eg siga, at eg visti ikki at vit høvdu so nógvar góðar sangarar í Føroyum. Bæði solistar og kór stóðu seg ómetaliga væl, og har var ikki nakað at seta ein fingur á. Tað tók tó eina løtu til ljóðgóskan var í toppi, men eftir stutta stund var hetta eisini komið í rættlag. Viðmerkjast skal, at tað er ein stór uppgáva fyri tann, ið stendur og miksar, at hava ábyrgdina og skil á so nógvum mikrofonum og ljóðførum í einum.

Kórið hevði sjálvandi eisini eitt gott orkestur aftan fyri seg. Orkestrið varð mannað av: Gunnari Guttesen, Sven Åga Drewsen, Henningi Nicodemussen og Bernhardi Petersen. So tá alt kemur til eitt ……….. United Voices … … … … … … … . "feitt"!!!!!!!

Eftir hesa framførsluna fingu vit presenteraða nýggju fløguna og nýggja orkestrið varð bjóðað vælkomið á pallin. Til hetta høvið varð orkestrið sett saman av útvaldum donskum tónlistamonnum: Troels Skovgaard, Niels Engell Hansen, Frank Anker, Torben Bruhn, og so sum rosinan í pylsuendanum, maður Lindu, Michael Holmberg, sum sló ígjøgnum. Sera vakurt varð byrjað við einum Preludium, sum Niels hevði skrivað ……. og so varð sett í gongd.

Vit vóru eins og førd út í ein annan heim, har Linda Holmberg sjálv, saman við kórinum, lyfti okkum upp í aðrar hæddir, og sum perlur á bandi komu aðrir sangir og solistar við, so sum Laila C. Hansen, Heine Lützen, Jónsvein Heinesen, Nomi Háberg Hansen. Alt bara riggaði til fulnar, men eisini varð stuttligt at hoyra samansettar røddir í summum sangum, sum t.d. tá Laila og Jónsvein sungu duett. Óført!!!

Tað tók eina løtu til fólk vóru komin í rættuligt "hopla", men tað eydnaðist, og rættuligt lív kom í, og enntá sungu øll væl við, tá løgini so hvørt gjørdust kend. Havast skal í huga, at alt tilfarið varð nýskrivað og ókent fyri áhoyrarunum.

Tíðin gekk alt ov skjótt og vit fingu eitt rættuligt "brak" av einum sangi til síðst, har Linda eisini nýtti høvið til at presentera tónleikararnar, sum so allir fingu høvið at spæla hvør sína solo uppá hvørt sitt ljóðføri – sera professionelt og væl spælt.

Hóast klokkan var farin av midnátt, so fingu vit eitt lag eyka og var tað tað vælkenda "Schakels", ið duettin Mary and Mary upprunaliga sungu inn á fløgu. Tá sungu øll við og stemningurin náddi sínum klimaksi og tað var eins og fýrverkið at enda brast, og hesa uppliving kundu øll taka heim við sær. Fantastiskt sungið, spælt og eitt gott show ……. bara ……. "feitt"!!!!!!!!!!!!!

Eg vil gjarna takka øllum fyrireikarunum fyri eina frálíka konsert og eina "feita" fløgu.





*Troels Skovgaard*



*Linda Holmberg*




Bilpakkar Summarsiglingin 2003

Tórshavn - Hanstholm ella hinvegin

| Lágárstið | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 4.900 | 5.580 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.920 | 4.960 | 5.600 | - | - | 7.120 |
| Bilur + 3 fólk | 3.220 | 4.000 | - | 4.780 | 5.200 | - |
| Bilur + 2 fólk | 2.520 | 3.040 | - | - | - | 4.120 |
| Bilur + 1 fólk | 1.720 | 1.960 | - | - | - | 2.520 |

| Háárstið | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 6.600 | 7.380 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 5.280 | 6.560 | 7.520 | - | - | 9.440 |
| Bilur + 3 fólk | 4.340 | 5.300 | - | 6.380 | 6.980 | - |
| Bilur + 2 fólk | 3.380 | 4.020 | - | - | - | 5.460 |
| Bilur + 1 fólk | 2.300 | 2.620 | - | - | - | 3.360 |

Tórshavn - Bergen ella hinvegin

| Lágárstið | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 3.600 | 4.400 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 2.880 | 3.520 | 4.000 | - | - | 4.800 |
| Bilur + 3 fólk | 2.320 | 2.800 | - | 3.280 | 3.520 | - |
| Bilur + 2 fólk | 1.760 | 2.080 | - | - | - | 2.720 |
| Bilur + 1 fólk | 1.160 | 1.320 | - | - | - | 2.000 |

| Háárstið | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 4.600 | 5.800 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.680 | 4.640 | 5.280 | - | - | 6.240 |
| Bilur + 3 fólk | 3.000 | 3.720 | - | 4.320 | 4.800 | - |
| Bilur + 2 fólk | 2.280 | 2.760 | - | - | - | 3.560 |
| Bilur + 1 fólk | 1.520 | 1.760 | - | - | - | 2.160 |

Tórshavn - Lerwick ella hinvegin

| Lágárstið | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 2.500 | 3.100 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 2.000 | 2.480 | 2.880 | - | - | 3.520 |
| Bilur + 3 fólk | 1.640 | 2.000 | - | 2.420 | 2.660 | - |
| Bilur + 2 fólk | 1.280 | 1.520 | - | - | - | 2.040 |
| Bilur + 1 fólk | 880 | 1.000 | - | - | - | 1.260 |

| Háárstið | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 3.300 | 4.200 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 2.640 | 3.360 | 3.760 | - | - | 4.640 |
| Bilur + 3 fólk | 2.180 | 2.720 | - | 3.200 | 3.500 | - |
| Bilur + 2 fólk | 1.700 | 2.060 | - | - | - | 2.700 |
| Bilur + 1 fólk | 1.160 | 1.340 | - | - | - | 1.680 |

Tórshavn - Seyðisfjørður ella hinvegin

| Lágárstið | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 4.200 | 5.000 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.360 | 4.000 | 4.560 | - | - | 5.760 |
| Bilur + 3 fólk | 2.740 | 3.220 | - | 3.880 | 4.240 | - |
| Bilur + 2 fólk | 2.100 | 2.420 | - | - | - | 3.300 |
| Bilur + 1 fólk | 1.400 | 1.560 | - | - | - | 2.000 |

| Háárstið | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað inni. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 5.700 | 6.600 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 4.560 | 5.280 | 6.080 | - | - | 7.680 |
| Bilur + 3 fólk | 3.700 | 4.240 | - | 5.140 | 5.620 | - |
| Bilur + 2 fólk | 2.840 | 3.200 | - | - | - | 4.400 |
| Bilur + 1 fólk | 1.880 | 2.040 | - | - | - | 2.660 |

Treytin fyri omanfyrinevndu bilpakkum er at ferðin byrjar og endar í Føroyum.



SMYRIL LINE
the North Atlantic Link

J. Broncksgøta 37
P.O. Box 370
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 345900
Telefax +298 345950
booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo